

*Fleiri nýggj føroyskt met vóru á Oyggjaleikaúttøkustevnuni um vikuskiftið*

# Magnus setti fimm met

**SVIMJING** Magnus Jákupsson, Havnar Svimjifelag, var sera eyðsýndur við nøkrum nýggjum føroyskum metum um vikuskiftið

Uni Holm Johannesen

Magnus Jákupsson legði nógv fyri á Oyggjaleikaúttøkustevnuni í Gundadali um vikuskiftið. Ungi havnarmaðurin setti ikki færri enn fimm føroysk met.

Tað var í bólkunum 200 metra ryggsvimjing, 100 metra ryggsvimjing, 100 metra firvald, 50 metra firvald og juniormet í 100 metra frí. Greiðar ábendingar um ein svimjara, sum væntandi fer at gera um seg á Oyggjaleikunum í summar.

**Hilnaðist væl**

Í alt hilnaðist Oyggjaleikaúttøkustevnan sera væl. Fleiri nýggj føroysk met vóru sett. Føroysk svimjing buldrar avstað í løtuni, og spurningurin er bara, hvør næsti føroyingurin verður, sum fer at eiga virknan leiklut millum heimsins bestu svimjarar.

*uni@sosialurin.fo*

# Hesi skulu umboða Føroyar

11 svimjarar kláraðu kravtíðina til Oyggjaleikir á Isle of Wight í summar. Svimjisambandið gevur eisini trý wildcard fyri at manna stafettirnar.



## Kvinnur:

**Astrið Foldarskarð**, Flot – 50 firvald
**Birita Debes**, Flot – 50 frí, 100 frí, 50 rygg, 100 rygg, 200 rygg, 50 firvald, 100 blandað
**Cecilia Eysturdal**, Ægir – 800 frí
**Eva Trygvadóttir**, Ægir – 50 bringa
**Kristina Eliasen**, Havnar Svimjifelag – 50 frí
**Poula Øssursdóttir Mohr**, Fuglafj. Svimjifelag – 50 rygg, 100 blandað
**Tanja Skaalum**, Susvim – 50 bringa
**Turið S. Christiansen**, Ægir – 100 bringa, 200 bringa

*Wildcard: Guðrun Mortensen, Susvim*

## Menn:

**Magnus Jákupsson**, Havnar Svimjifelag – 50 rygg, 100 rygg, 50 firvald, 100 firvald
**Pauli Øssursson** Mohr, Havnar **Svimjifelag** – 50 bringa
**Pál Joensen**, Susvim – 200 frí, 400 frí, 1500 frí, 50 bringa, 100 bringa, 200 firvald

*Wildcard: Dánjal Hestoy, Havnar Svimjifelag og Heðin L. Olsen, Ægir*

# Kristina tók øll á bóli



*Kristina Eliasen skal umboða Føroyar á Oyggjaleikunum í summar*

**SVIMJING** 17 ára gamla Kristina Eliasen, Havnar Svimjifelag, kom fyrst á mál í 50 metra frí hjá kvinnum fyrrapartin leygardagin. Hon tók øll á bóli og tryggjaði sær luttøku til Oyggjaleikirnar

Uni Holm Johannesen

Kristian Eliasen er eitt nýtt navn í føroyskari svimjing. Tað var ikki væntað, at hon fór at vinna í 50 metra frí, men hon fekk bæði gull og tryggjaði sær luttøku til Oyggjaleikirnar í summar.

Tíðin var 26,65 sekund, og tað er undir kravtíðina, sum er 26,91 sekund. Birita Debes var nummar tvey við tíðini 26,92 sekund. Hon hevur staðið kravtíðina við sínum juniormeti, 26.54, á Ægir-stevnuni í februar.

*uni@sosialurin.fo*

# Føroysku metini

*Hesi settu føroyskt met á Oyggjaleikaúttøkustevnuni í Gundadali um vikuskiftið*

| NAVN OG FELAG | BÓLKUR | TÍÐIN |
|---|---|---|
| Magnus Jákupsson, HS | 200 metra ryggsvimjing | 2:03.12 |
| Magnus Jákupsson, HS | 100 metra ryggsvimjing | 55.64 |
| Magnus Jákupsson, HS | 100 metra firvald | 55.60 |
| Magnus Jákupsson, HS | 50 metra firvald | 24.92 |
| Magnus Jákupsson, HS | 100 metra frí, juniormet | 51.81 |
| Turið S. Christiansen, Ægir | 100 metra bringusv. (juniormet) | 1:14.70 |
| Turið S. Christiansen, Ægir | 200 metra blandað (juniormet) | 2:26.55 |
| Turið S. Christiansen, Ægir | 200 metra bringusvimjing | 2:38.31 |
| Eva Trygvadóttir, Ægir | 50 metra bringusvimjing | 34.29 |
| Pauli Øssursson Mohr, HS | 50 metra bringusvimjing | 29.08 |
| Cecilia Eysturdal, Ægir | 200 metra frísvimjing (juniormet) | 2:07.91 |
| Birita Debes, Flot | 50 metra firvald | 28.85 |
| Poula Ø. Mohr, FS | 100 metra blandað | 1:07.28 |